# Realskúlanæmingar í 1964



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66 ”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her eru nakrir realskúlanæmingar inni hjá Frøken Cohr, lærara, til ein fráfaringarnátturða. f.v.: Lis Djurhuus (Hammer), Alan Brockie og Anfríði Dam Jacobsen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 484).

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*

# Mansstevna í Badmintonhøllini

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 24. oktober kl. 14 verður temadagur fyri menn í Badmintonhøllini í Klaksvík.

Millum luttakararnar verða tríggir trúboðarar: Óli á Grømma, Sonni Poulsen og Jógvan Júst Rasmussen. Sangbólkurin Vitin og manskór fara at syngja, eins og góður felagssangur verður. Stevnan er fyri allar menn og er ókeypis. Ikki er neyðugt við tilmelding. Tað er samkoman Betesda í Klaksvík, sum skipar fyri stevnuni.



## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Erland Jacobsen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin kl. 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

**Tróndur Johannesen í Klaksvík**, ættaður úr Fuglafirði, andaðist mikudagin á Sambýlinum á Heygum, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 13.30 úr Betesda. Tey, ið vilja minnast Trónda, kunnu lata Sambýlinum á Heygum eina peningagávu. Konta í Norðoya Sparikassa

**Curt Nielsen, fyrrverandi trúboðari á Sandoynni**, fer til gravar leygardagin kl. 14 úr Bykirken, Østergade 57-59, 5000 Odense.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður, pápi og abbi okkara

**Gunnar Poulsen**
Í Myllugarði
Sumba

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Takk til Patrick De Neergaard, prest, fyri góð og troystarrík orð í Kapellinum og við jarðarferðina úr Sumbiar kirkju.
Takk til kirkjutænarar, urguleikarar, berarar og sangarar.
Hjartans takk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk til tykkum øll, sum vóru og eru um okkum í hesi sváru tíð.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til Sumbiar kirkju.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Betty, Jan, Mariann, Gunnrið, Tóki og Jørn**

# MERKISDAGAR

**70 ára føðingardagur**
Týsdagin 20. okt. verður Harry Jacobsen, Toftir, 70 ár. Dagurin verður hildin heima hjá Harry og Solveig á Lýðarsvegi 20, tann 24. okt. frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Onsdagin 21. okt. fylti Jensa Poulsen, Sumba, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 24. okt. kl. 19 í dansistovuni í Sumba.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 27. okt. verður Rósing Rasmussen, Runavík, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 24. okt. verður Karin Breiðaskarð, Fuglafjørð, 90 ár. Dagurin verður hildin í Vesturstovu frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 29. okt. fyllir Jensia Svabo Thomasen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin heima, Giljavegur 62, frá kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 25. okt. hava Signhild og Eliesar Høj, Strendur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum og familju teirra.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

### Dagurin

23. oktober. Severinus, deyður umleið ár 400. Biskupur í Køln. Í Danmark er hann komin í bland við tann halga mannin Sørin í Ry í Jútlandi. Latínskt navn, ið merkir tann strangi ella álvarsami.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*